

# Leys størv í Tórshavnar kommunu

## Deildarleiðara til Tjarnargarð
Lýst verður eftir deildarleiðara til Tjarnargarð at seta skjótast gjørligt, setanarbrøkur 0,8.

Tjarnargarður er røktarheim við 34 búplássum, dagumlætting fyri minnisveik, fysio- og ergoterapi fyri heimabúgvandi pensjonistar og búfólk á stovninum, – skipað í fleiri eindir.

Tann eindin, vit søkja eftir deildarleiðara til, hevur 12 búfólk, har røktarstarvsfólk við ymiskum røktarútbúgvingum og royndum starvast.

Krøv til umsøkjarin er, at viðkomandi hevur útbúgving sum sjúkrarøktarfrøðingur og starvsroyndir. Hygg inn á www.torshavn.fo eftir lýsing av 'deildarleiðarastarv á Tjarnargarði'.

Løn og setanartreytir smb. sáttmála við Felagið Føroyskir Sjúkrarøktarfrøðingar. Umsóknir við avriti av prógvi og møguligum viðmælum skulu vera hjá Tórshavnar kommunu, Postboks 32, 110 Tórshavn, í seinasta lagi mánadagin 6. juli 2009.

Meira fæst at vita um størvini við at venda sær til Beintu Áargarð ella Helenu Poulsen, telefon 30 20 75.

## Maskinsmiður og verkstaðsfólk
Til verkstaðið hjá Tórshavnar kommunu verður søkt eftir tveimum dugnaligum fólkum.

**Maskinsmiður**
Sum maskinsmiður fært tú nógvar ymiskar arbeiðsuppgávur í einum sera spennandi umhvørvi. Góðar arbeiðsumstøður á einum verkstaði við góðari útgerð.

**Arbeiðsuppgávur**
Nakrar av høvðusuppgávunum verða m.a.
- sveisiarbeiði innan og uttandura
- umvæling av maskinum, bilum, tólum o. t.
- annars vanligt verkstaðsarbeiði

**Førleikakrøv**
Neyðugt er, at tann, ið settur verður, hevur útbúgving sum maskinsmiður, hevur førarabræv til akfar yvir 3500 kg og hevur fyrstahjálparprógv.

Nevnda koyrikort og fyrstahjálp kann takast innan 6 mðr. eftir setan.

**Verkstaðsfólk**
Sum verkstaðsfólk fært tú nógvar ymiskar arbeiðsuppgávur í einum sera spennandi umhvørvi. Góðar arbeiðsumstøður á einum verkstaði við sera góðari útgerð.

**Arbeiðsuppgávur**
Nakrar av høvuðusuppgávunum hjá verkstaðsmanninum verða m.a.
- umvæling av maskinum, bilum, tólum o. t.
- vanligt viðlíkahald

**Førleikakrøv**
Neyðugt er, at tann ið settur verður, hevur handverkaraútbúgving, helst entreprenør-mekanikari, annars bilmekanikari ella líknandi, hevur førarabræv til akfar yvir 3500 kg, er handaligur og hevur fyrstahjálparprógv.

Nevnda koyrikort og fyrstahjálp kann takast innan 6 mðr. eftir setan.

**Lønar- og setanartreytir**
Størvini er mánaðarlønt eftir sáttmála millum Landsfelag Handverkaranna og Fíggjarmálaráðið og verða sett skjótast til ber.

**Umsóknir**
Umsókn saman við viðmælum og upplýsingum um útbúgving og royndir skulu vera hjá Tórshavnar kommunu, Postboks 32, 110 Tórshavn, í seinasta lagi 6. juli 2009 kl. 12.00. Merkið umsóknina antin »Maskinsmiður« ella »Verkstaðsfólk«.

**Nærri fæst at vita**
Meira fæst at vita um størvini við at venda sær til Atla Simonsen, verkstaðsleiðara, ella Kartna Jacobsen, sløkkiliðsstjóra, á telefon 30 21 00.

## Starvsfólk til Frítíðarskúlan Smílibýlið
Søkt verður eftir tveimum pedagogum at arbeiða 30 tímar um vikuna at byrja 15. august 2009 ella eftir nærri avtalu. Tveimum hjálparfólkum, fyri hjálparfólk í barsilsfarloyvi, at arbeiða 27 tímar um vikuna at byrja 15. august 2009 ella eftir nærri avtalu. Farloyviðstíðin er fram til 31. mai 2010. Eisini verður søkt eftir einari køkshjálp at arbeiða 20 tímar um vikuna at byrja 15. august 2009 ella eftir nærri avtalu.

**Setanarviðurskifti**
Størvini sum pedagogur/hjálparfólk verða sett sambært sáttmála við Føroya Pedagogfelag og Kommunala Arbeiðsgevarafelag Føroya. Starvið sum køksfólk verður sett sambært sáttmála við avvarðandi yrkisfelag.

**Umsóknir**
Umsóknir við avriti av prógvi og møguligum viðmælum skulu vera hjá Frítíðarskúlanum Smílibýlið, Stoffalág 82, 100 Tórshavn, í seinasta lagi mánadagin 6. juli 2009.

**Nærri fæst at vita**
um størvini við at venda sær til Noomi á Válinum, leiðara, telefon 31 4879 ella 21 48 79.

## Pedagogur til Dagstovnin við Landavegin
Søkt verður eftir einum pedagogi at arbeiða 30/35 tímar um vikuna at byrja 3. august 2009 ella eftir nærri avtalu.

**Setanarviðurskifti**
Starvið verður sett sambært sáttmála millum Føroya Pedagogfelag og Kommunala Arbeiðsgevarafelag Føroya.

**Umsóknir**
Umsóknir við avriti av prógvi og møguligum viðmælum skulu vera hjá Dagstovninum á Landavegnum, Landavegur 84, 100 Tórshavn, í seinasta lagi mánadagin 6. juli 2009.

**Nærri fæst at vita**
um starvið við at venda sær til Kirstin Djurhuus, stovnsleiðara, á telefon 30 23 80 / 22 23 80, ella Brynhild Guttesen, varaleiðara, á telefon 25 07 04.

## Pedagogur til Frítíðarskúlan í Badmintonhøllini
Søkt verður eftir einum pedagogi at arbeiða 25 tímar um vikuna at byrja 10. august 2009 ella eftir nærri avtalu.

**Setanarviðurskifti**
Starvið verður sett sambært sáttmála millum Føroya Pedagogfelag og Kommunala Arbeiðsgevarafelag Føroya.

**Umsóknir**
Umsóknir við avriti av prógvi og møguligum viðmælum skulu vera hjá Frítíðarskúlanum í Badmintonhøllini, Gundadalur, 100 Tórshavn, í seinasta lagi mánadagin 6. juli 2009.

**Nærri fæst at vita**
um starvið við at venda sær til Jan Laursen, leiðara, telefon 28 49 02, ella við at hyggja á heimasíðu okkara www.123hjemmeside.dk/ftsbadmintonhollini.

## Pedagogur og hjálparfólk til Dagstovnin Lítlaskóg
Søkt verður eftir einum pedagogi til vøggustovu at arbeiða 20 tímar um vikuna at byrja 3. august 2009 ella eftir nærri avtalu. Søkt verður eisini eftir einum hjálparfólki til barnagarð at arbeiða 35 tímar um vikuna at byrja 3. august 2009 ella eftir nærri avtalu.

**Setanarviðurskifti**
Størvini verða sett sambært sáttmála millum Føroya Pedagogfelag og Kommunala Arbeiðsgevarafelag Føroya.

**Umsóknir**
Umsóknir við avriti av prógvi og møguligum viðmælum skulu vera hjá Lítlaskógi, boks 217, 110 Tórshavn, innan mánadagin 29. juni 2009.

**Nærri fæst at vita**
um størvini við at venda sær til Beintu Dalbø, stovnsleiðara, telefon 21 91 35.

Tórshavnar kommuna

Sosialurin